# Í Føroyum sleppur tú at nýta handverkið

**– At stýra einum flogfari til Føroya er nakað heilt serligt fyri eini flogskipara. Í dag verður tað mesta stýrt við radarum og øðrum teknikki, men á Føroyaleiðini er øðrvísi. Her sleppur tú veruliga at vísa, at tú dugir flogskipara-handverkið til lítar, og tað dámar mær væl sigur Poul Erik Vittrup, sum týsmorgunin fleyg sín seinasta túr til Føroya við Mærsk**

SEINASTI TÚRUR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*




*Danski flogskiparin og hansara crew*



– Tað er altíð spennandi at flúgva upp til Føroyar. Í góðum veðri fært tú møguleikan at síggja frálíku náttúruna, og í ringum veðrið er vanliga talan um eina rættiliga spennandi avbjóðing fyri ein flogskipara.

Týsdagurin fer leingi at standa sólarklárur í minninum hjá flogskiparanum Poul Erik Vittrup. Danin hevur síðan 1996 verið flogskipari hjá Mærsk á Føroyaleiðini, men vegna aldur var týsdagurin seinasti arbeiðsdagur hjá danska flogskiparanum. Í samband við seinasta arbeiðsdag hjá Poul Eriki á Føroyaleiðini, var skipað fyri eini móttøku á flogvøllinum í Vágum fyri dámliga dananum.

Poul Erik Vittrup hevur starvast sum flogskipari hjá Mærsk síðan 1976, og hann hevur sostatt verið flogskipari seinastu 24 árini. Spurdur, hvussu tað kendist at flúgva inn eftir Sørvágsfirði fyri seinastu ferð, svaraði flogskiparin hjá Mærsk, at tað kendist løgið, og tað óivað fer at taka nakrar dagar, áðrenn hann veruliga hevur fatað, at flogferðin var hin seinasta.



*Á seinastu ferðini til Føroya varð Poul Erik Vittrup heiraður við einum heiðursportri*



*Frá Flogfelagi Føroya fekk Poul Erik Vittrup eina málning í heiðursgávu, nú hann gevst á Føroyaleiðini*

### Veruliga royna seg

Danski flogskiparin er eitt sindur trekur at fáa at siga, hvør túrur til Føroya hevur verið tann baldruttasti. Hann ber seg eitt sindur undan, men sigur kortini, at tað ikki altíð er so tespiligt at koma eftir Sørvágsfirði, tá nógvur sunnanvindur er.

Poul Erik Vittrup hevur øll átta árini, hann hevur flogið til Føroya, savnað hagtøl frá túrunum.

– Í dag var mín 352 túrur til Føroya. Síðan eg fór undir at flúgva til Føroya, havi eg bert verið noyddur at venda aftur fýra ferðir vegna veður, og tað haldi eg ikki er so galið, greiðir fráfarandi flogskiparin frá.

Honum hevur dámt ómetaliga væl at flúgva til Føroya.

– At stýra einum flogfari til Føroya er nakað heilt serligt fyri eini flogskipara. Í dag verður tað mesta stýrt við radarum og øðrum teknikki, men á Føroyaleiðini er øðrvísi. Her sleppur tú veruliga at vísa, at tú dugir flogskiparahandverkið til lítar, og tað dámar mær væl sigur Poul Erik Vittrup



*– Tað er altíð spennandi at flúgva upp til Føroyar. Í góðum veðri fært tú møguleikan at síggja frálíku náttúruna, og í ringum veðrið er vanliga talan um eina rættiliga spennandi avbjóðing fyri ein flogskipara*

### Søga og klintring

Hóast Poul Erik Vittrup júst hevur rundað pensiónsaldur, hevur hann ongar ætlanir um at liggja á latu síðuni. Eftir summarfrítíðina fer hann at undir at lesa søga á universitetinum í Keypmannahavn. Seinni í heyst ætlar hann sær at klintra á Mount Everest.

Hann hevur áður roynt seg á Mount Everest, og vil fegin royna tað aftur.

Ampaljóð:

# Spren Rex í Vertshúsinum

**Í dag verður útgávufagnaður á Vertshúsinum í Havn. Luttakandi bólkarnir eru: 48 Pages, Speaker, Zink, Lama Sea**

ÚTGÁVUFAGNAÐUR
*Tíðindaskriv*

Í dag, mikudagin kl 15.30, verður útgávufagnaður í Vertshúsinum (um viðrar) uttan fyri.

À skránni er tónleikur av nýggju fløguni Ampaljóð, sum Spren Rex júst hevur sent á marknaðin. Ein undirgrundsfløga við 4 av teim allarbestu rokkarabólkunum í Havn í dag.

Pallurin mikudagin, verður vónandi sólríka vælsvingandi parkeringsøki uttan fyri Vertshúsið.

Høvi verður at hoyra og ogna sær fløguna og at hoyra tónleikin hjá bólkunum live.

Bólkarnir spældu á sera væleydnaðu og vælumtøktu ROX 2004 í Badmintonhøllini leygarkvøldið.

Siðursrøðin heldur fram í Fuglafirði fríggjakvøldið 25. juni, tá væntandi allir ungdómar í Eysturoy og aðra staðni við fara at feira, at skúlin er liðugur og setur kósina í Mentunarhúsið at rokka saman við bólkunum umframt DJ Switch.




**Hjálparfólk**
til slaktaran í Miklagarði

Slaktarin í Miklagarði í SMS søkir eftir fólki at byrja skjótast gjørligt. Ert tú slaktari, kokkur ella hugaður fyri at arbeiða við mati og kjøti, ert tú kanska tann rætti. Vit vænta, at tú ert arbeiðssamur, ágrýtin og røkin.

Starvið er fulltíðarstarv. Løn sambært galdandi sáttmála.

Er hetta nakað fyri teg, so send eina umsókn til Miklagarð, Postsmoga 1069, 110 Tórshavn, att: Jørgen Jørgensen. Tað ber eisini til at ringja til Jørgen á tel 21 74 04 og hoyra nærri um starvið.

*Miklagarður er størsti matvøruhandil í Føroyum við eini gólvvídd upp á 1.700 fermetrar og við meiri enn 10.000 vørunumrum. Í Miklagarði starvast 80 fólk.*

MIKLAGARÐUR
SMS • Postboks 1069 • 110 Tórshavn • Tel 31 30 11

WWW.SMYRIL-LINE.COM



Á túrunum spæla m.a. »Spaðar 5«, »Tey av Kamarinum«, »Showmenn« og »Havkallar«

DANMARK

1 VIKA Í DANLAND-ÍBÚÐ
FYRI 2 VAKSIN & 2 BØRN + BIL
DANLAND Í BLOKHUS & HIRTSHALS
13/8, 20/8, 27/8 & 3/9 úr 7.950,-
**Íroknað er:** Ferðin fram og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Uppihald í Danland-íbúð í 1 viku.

1 VIKA Í SUMMARHÚSI
FYRI 2 VAKSIN & 2 BØRN + BIL
DANCENTER-SUMMARHÚS
13/8, 20/8, 27/8 & 3/9 úr 7.780,-
**Íroknað er:** Sigling Tórshavn-Hanstholm og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Uppihald í 1 viku í summarhúsi.

1 VIKA Í SUMMARHÚSI
FYRI 2 VAKSIN & 2 BØRN + BIL
SKALLERUP KLIT FERIECENTER
13/8, 20/8, 27/8 & 3/9 úr 9.400,-
**Íroknað er:** Sigling Tórshavn-Hanstholm og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Uppihald í 1 viku á Skallerup Klit Feriecenter.

super AUGUST TILBOÐ

NOREG

1 VIKA Á PERS HOTEL
FYRI 2 VAKSIN & 2 BØRN + BIL
Í SMÁTTU Í GOL Í NOREGI
9/8, 16/8, 23/8 & 30/8 úr 6.890,-
**Íroknað kostnaðin:** Sigling Tórshavn-Bergen og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Hartil 7 gistingar í smáttu, uttan kost.



Á FERÐUNUM fara heimskendir pianoentertainarar, sum Stefan Ujvari (NO) og Göran Berndsson (SE) at borðreiða við fjølbroyttum tónleiki umborð.

HETLAND

1 VIKA Í SUMMARHÚSI
FYRI 2 VAKSIN & 2 BØRN + BIL
2-RÚMS ÍBÚÐ Í EASTERHOULL CHALETS
9/8, 16/8, 23/8 & 30/8 úr 6.980,-
**Íroknað er:** Ferðin fram og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Uppihald í 1 viku í summarhúsi.

SMYRIL LINE
J. Broncks gøta 37 · Postsboks 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo